**Vit avnokta djevulin og allar gerningar hans og allan atburð hans.**

**Vit trúgva á Gud faðir, hin alvalda, skapara himins og jarðar.**

**Og á Jesus Krist,**

**Guds einborna son, váran harra,**

**sum er gitin av heilagum anda,**

**borin í heim av Mariu moy,**

**pínslaður undir Pontiusi Pilatusi,**

**krossfestur, deyður og jarðaður, niðurfarin til heljar,**

**triðja dagin staðin upp frá deyðum,**

**farin til himmals,**

**sitandi við høgru hond Guds faðirs hins alvalda,**

**haðani hann kemur at døma livandi og deyð.**

**Og á heilagan anda,**

**eina heilaga almenna kirkju,**

**samfelag teirra heilagu,**

**fyrigeving syndanna,**

**uppreisn likamsins**

**og lív um aldur og ævir.**